# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Føroyameistarakapping í fýra teimum yngstu aldursbólkunum verður í Badmintonhøllini leygardagin*

## Badmintonbørn kappast um FM

**Fyri fyrstu ferð fara børn undir níggju ára aldur at spæla um føroyameistaraheiti í badminton, tá FM-kappingarnar verða leygardagin**

BADMINTON
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Leygardagin verður kappast um føroyameistaraheiti hjá børnum frá morgninum til langt út á seinnapartin. Ikki færri enn fýra aldursbólkar fara at kappast.

Mest merksvert er, at børn undir níggju ára aldur fyri fyrstu ferð fara at kappast um føroyameistaraheiti, tí fyrsti bólkurin, sum fer á gólvið í Badmintonhøllini í Havn leygarmorgunin klokkan níggju, er bólkurin U9.

Síðani verður hildið fram við hinum bólkunum soleiðis, at U11 byrjar klokkan 11, U13 byrjar klokkan 13 og bólkurin U15 byrjar klokkan 15.

Luttakaragjaldið til kappingina er 50 krónur, og tilmeldast er hálvan tíma undan kappingini.

## KÍF-kapping fyri tey yngru

**Tilsamans 23 lið hava meldað seg til flogbóltskappingina fyri tey yngru liðini, sum KÍF skipar fyri leygardagin**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Nú kappingarárið í flogbólti er av, hava summi framvegis hug at spæla eitt sindur aftrat, og tí hevur KÍF tikið stig til eina kapping aftrat fyri yngru deildirnar, sum verður í Kollafirði leygardagin. Tá freistin var úti, høvdu tilsamans 23 lið meldað til, og kappast verður í tilsamans fimm deildum.

Hjá kvinnuunglingum eru seks lið í tveimum bólkum, har Fleyr a, KÍF og Mjølnir b eru í bólki 1 og SÍ, Mjølnir a og Fleyr b í bólki 2. Umframt bólkaspælið verður finala og dystur um triðjapláss.

Hjá mansunglingunum eru trý lið – SÍ, Mjølnir og Muffinar – og tey spæla øll í einum bólki, so vinnarin av bólkinum verður somuleiðis vinnari av kappingini.

Sama mannagongd er hjá gentum 14 ár, gentum 12 ár og gentum 10 ár, har øll tey tilmeldaðu liðini spæla í einum bólki og bólkavinnarin vinnur kappingina.

Hjá gentum 14 ár eru liðini KÍF, Fleyr a, Mjølnir og Fleyr b, hjá gentum 12 ár Fleyr, Mjølnir a, KÍF a, Mjølnir b og KÍF b, og hjá gentum 10 ár eru liðini KÍF a, Fleyr a, KÍF b, Fleyr b og KÍF c.

# Føroyar ganga undan í UEFA

**Føroyar eru millum tey 20 fyrstu limalondini í UEFA, sum komu við í ta nýggju UEFA-dómarakonvensjónina**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*



*Umboð fyri FSF og UEFA avmyndað á ársfundinum hjá UEFA, sum var í Bella-sentrinum í Keypmannahavn. Frá vinstru Michel Platini, UEFA-forseti, Niklas á Líðarenda, formaður í dómaranevndini hjá FSF, Høgni í Stórustovu, FSF-forseti, Ísak Mikladal, FSF-aðalskrivari, og David Taylor, UEFA-aðalskrivari*

*Mynd: FSF*

Týsdagin, tá UEFA helt ársfund í Bella-sentrinum í Keypmannahavn, skrivaðu Høgni í Stórustovu, forseti, og Ísak Mikladal, aðalskrivari, vegna Fótbóltssambandið undir dómarakonvensjónina hjá UEFA, og fyri europeisku fótbóltssamgonguna skrivaðu Michel Platini, forseti, og David Taylor, aðalskrivari, undir.

Henda konvensjón er ein millumtjóða avtala millum limalondini í UEFA, sum hevur til endamáls at hækka stigið á øllum tí arbeiði, sum hevur við døming, útbúgving og umsiting av fótbóltsdómarum at gera.

Farið var undir at gera eina dómarakonvensjón í 2003, og avtalan var staðfest í 2006, tá fyrstu 10 limalondini í UEFA skrivaðu undir hana, og í 2007 komu so trý lond uppí aftrat. Tá Føroyar skrivaðu undir týsdagin, var konvensjónin eisini undirskrivað av Íslandi, Hollandi, Norðurírlandi, Malta, Slovakia og Svøríki. Frammanundan eru Belgia, Finnland, Frakland, Týskland, Ungarn, Luxembourg, Norra, Skotland, Slovenia, Sveis, Eysturríki, Danmark og Írland við.

Dómarakonvensjónin setir serlig krøv til útbúgving av dómarum og eygleiðing, men eisini til venjing og menning av dómarum. Konvensjónin krevur eisini eina sokallaða mentor-skipan, ið hjálpir nýggjum dómarum væl í gongd.

Fótbóltssambandið hevur í tvey ár miðvíst arbeitt fyri at komið við í hetta samstarvið, og hesi árini eru sett krøv til dómarar og útbúgving av dómarum sambært konvensjónini.

# Steypakappingarnar hjá teimum yngru eru lagdar

**Fyrrapartin í gjár vóru lutakastini um, hvussu fyrstu umførini í steypakappingunum hjá teimum yngru í fótbólti skulu síggja út**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan*
*einslistir@kallnet.fo*



*Sunniva Kollslíð og Niclas Davidsen tóku sær av lutakastinum til steypakappingarnar hjá teimum yngru*

*Mynd: FSF*

Eftir at lutakast hevur verið um steypakappingarnar hjá bæði kvinnum og monnum, var í gjár skipað fyri lutakasti um, hvussu steypakappingarnar hjá teimum yngru í fótbólti skulu spælast.

Talan er um fimm kappingar, har unglingar kappast um Thomas Dam Intersport-steypið, gentur 14-17 ár spæla um Mótasteypið, dreingir spæla um Blaðberarasteypið, smágentur spæla um Niels L. Argesteypið og smádreingir um Cadburysteypið.

Lutakastið var í FSF-húsinum fyrrapartin í gjár, har Niclas Davidsen, formaður í ungdómsnevndini hjá Fótbóltssambandinum, og Sunniva Kollslíð, skrivari ungdómsnevndini og kappingarnevndini, hildu skil á, hvussu tey ymsu liðini í teimum ymsu deildunum møtast í fyrstu steypadystunum.

Tað ber til at síggja allar steypakappingarnar 2009 inni á heimasíðuni hjá Fótbóltssambandinum, www.fsf.fo.